# umhvørvi



*Íalt høvdu 125 fólk møguleika at uppliva eina serstaka jødiska páskamáltíð*



*- Hetta er breyðið í trongdunum, sum okkara andaligu brøður í Egyptalandi ótu við sorg, og sum Jesus eisini át við sorg síðsta kvøldið áðrenn hann leið, segði Frans Jensen sum leiddi kvøldið*

høvuðstalari. Eisini verður Eivind Frøen úr Noregi við.

**Endurreisn**

Wilson Goeda hevur í meira enn 10 ár undirvíst í Guðs Orði víða hvar í heiminum.

Hann er uppvaksin í afrikanskari mentan undir apartheid-stýrinum, og hevur tessvegna góðar fortreytir fyri at kunna geva menniskjum ein boðskap um endurreising og grøðing fyri tað innara menniskja.

Hann er so farin út at undirvísa í Guðs orði upp á ein sera einfaldan máta, men við stórari salving yvir sær.

Um seg sjálvan sigur Goeda: “Eg havi halgað meg at síggja milliónir menniskju verða sátt við seg sjálvan, við øll menniskju og við Guð”.

Eftir páskastevnuna í Oasuni verða stórmøti hildin í ítróttarhøllini í Vági, har bæði Wilson og Eivind Frøen tala. Við hesi møti luttaka kórið í Sumba og Streingjakórið í Porkeri.



*Wilson Goeda úr Suðurafrika verður høvuðstalari á páskastevnuni í Havn*

## Páskastevna í nýggjum Meinigheitshúsi

**Skála:** Í farna mánaði tók meinigheitin á staðnum tað nýggja meinigheitshúsið í nýtslu. Hetta prýðiliga hús skal standa sína roynd, nú páskir standa fyri framman. Stýrið fyri húsið hevur lagt eina møtiskrá fyri hesar dagarnar.

Páskastevnan byrjar við gudstænastu skírisdag kl. 18 í Skála kirkju, har sóknarpresturin Jógvan Fríðriksson talar, og kl. 21 verður møti har ung syngja og vitna.

Langafríggjadag er møti kl. 19 har Regin Høgnesen, trúboðari talar og Bethania-kórið í Gøtu syngur.

Páskaaftan koma havnafólk at vitja. Talari hetta kvøldið er Klæmint Tausen og sangur verður frá Meinigheitskórinum.

Páskadag kl. 11 er familjugudstænasta við Jógvan Fríðriksson og øðrum luttakarum, og kl. 19 møti við Marius Jacobsen og Taborkórinum á Toftum.

Stevnan endar 2. páskadag kl. 19 har Niels Jacob Nielsen, trúboðari talar og Skálakórið syngur.

Sagt verður, at bønarmøti verða ein hálvan tíma áðrenn hvørt møtið.

**sb.**

## Barnavinarlig møtir á páskum

**Ebenezer, Havn:** Hóast stóru samfelagsstevnuna í Fuglafirði, hevur samkoman Ebenezer kortini eina spennandi páskaskrá.

Møtini um páskini byrja skíriskvøld kl. 18 har Símin Olsen talar langafríggjadag kl. 18 har Jón Eliasen talar. Við bæði kvøldini verður søga til børn.

Páskadag kl. 10 er Minnismáltíð Harrans. Við hetta møtið talar Jógvan Jacobsen og kl. 12 er sunnudagsskúli, har øll eru saman. Kl. 18 er evangeliskt møti har Øssur Andreasen og Rólant í Skorini tala. Her verður eisini søga til børnini.

Sagt verður, at ætlanin er at gera møtini barnavinarlig. Á møtunum verður tí ein søga við myndum, eins og miðað verður eftir at møtini ikki verða stórt longur enn ein tíma.

**sb.**

## Serstøk páskavitjan úr Klaksvík

**Kalsoy:** Á páskum vitja nógv fólk út á bygdirnar kring landið. Kalsoyggin er helst einki undantak í so máta.

Nú hava Pól Johannesen, trúboðari hjá Heimamissiónini og Øssur Kjølbro, missiónsleiðari hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum lagt ætlanir saman um at fara út í Kalsoynna um skírishalguna at hava møtir á Húsum og Mikladali.

Møtini byrja skírisaftan, tá ungdómsmøti verður í bygdarhúsinum á Húsum. Skírisdag verður møti í Mikladals kirkju og langafríggjadag er familjumøti á sama staði.

Tey, sum eru stødd á Kalsoynni um páskirnar fáa her møguleika at hoyra bæði talur, sangir, bíbliusøgur og vitnisburðar.

**sb.**

## Oratorium um Judas

**Strendur:** Tað er ikki á hvørjum degi at eitt nýskrivað oratorium verður framført á føroyskari jørð.

Tey sum fara í Sjóvar kirkju langafríggjadag fáa kortini hetta forvitnisliga høvið, tá verkið “Judas Iskariot” verður framført.

Tað er norðmaðurin Tord Gustavsen sum hevur gjørt tónleikin, meðan ein annar norðmaður, Willy R. Kastborg sum er búsitandi á Strondum hevur gjørt tekstin.

Kórið Tarita undir leiðslu av Sunnleifi Rasmussen fer at framføra tónaverkið.

**sb.**

## Børnini syngja páskini inn

**Kunoy:** Aftur í ár verður skipað fyri serstakari barnasangløtu í Kunoyar kirkju skíriskvøld.

Í fjør varð ein líknandi gudstænasta hildin sama dag og á sam staði, og var undirtøkan sera góð.

– Kirkjan var fullsett, og vóna vit, at aftur í ár verður líka góða undirtøka, siga stigtakararnir til hetta tiltakið. Í ár verður tað barnaráðgevin hjá Heimamissónin Marjon Poulsen, sum fer at luttaka.

**sb.**